

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 05 - 2012

# Norðsjóvaroljan gevur meiri enn mett

Tann høgi oljuprísurin og ein sterkur amerikanskur dollari koma danska ríkiskassanum so væl við, at sambært stjórnini fær ríkiskassin 2,5 milliardir krónur meiri burtur úr oljuni í Norðsjónum í ár, enn stjórnin fyrr hevur mett. Harafturat metir stjórnin, at næsta ár fer oljan at geva eina hálva milliard krónur meiri enn mett. Hetta stendur at lesa í búskaparligu frágreiðingini, sum stjórnin legði fram í vikuni. Men vandi er í hvørjari vælferð. Stjórnin skrivar í frágreiðingini, at rakstrarútreiðslurnar hjá oljufeløgunum verða størri, enn tey hava mett fyrr. Tí verður avlopið hjá feløgunum minni, og tað ávirkar eisini tann partin av oljuinntøkunum hjá statinum tann skeiva vegin.